

líka so
uni. Fyri mong er als ikki
uttan at hava verið til
rnir í flestu róðrunum so
láss, er spenningur eftir.
er lítið vert uttan sigra
tið er at ivast í, at hvør
ur í spenni og gevur alt
arnar, sum skulu rógvast

. juli kl. 15.00.



FÓLKAFUNDUR Á DOKTARAGRUND

Unga Tjóðveldið skipar aftur í ár fyri fólkafundi úti á Reyni í Havn. Helst er tað ein fyrimunur at hava somu politisku hugsjón sum fyrireikararnir, men tað er absolutt einki krav, tí fólkafundurin er eisini tónleikur, sjónleikur, undirhald og íblástur. Einki ár er eins, men felagsnevnarin frá ári til árs, er, at hýrurin er góður og at fólk standa sum sild í tunnu, meðan sitandandi samgonga verður húðflett og Tjóðveldi hálovað – eisini við einum speiskum tóna.

Tíð og stað: Doktaragrund úti á Reyni.
29. juli kl. 19.00



MIDNÁTTARSANGURIN

Fyri mong er hetta hæddarpunktið á ólavsøku. Felagssangurin á Vaglinum í miðbýnum er í øllum førum hugnaligasta løtan, har fólk standa sum sild í tunnu og syngja so hjartaliga. Fosturlandssangir og kærleikskvøður frambornar av túsundtals føroyingum er ein vøkur samanseting. Fullkomna punktumið er føroyski dansurin aftaná – av sonnum ein hátíðarløta á tjóðardegnum.


Tíð og stað: Vaglið og



ÓLAVSØKUHALDIÐ HJÁ RÁS2

Fjórða árið á rað skipar Rás2 fyri tiltakið út úr Rásarúminum í Vágsbotni. Túsundtals fólk hava hvørt ár lýtt á, meðan "Haraldur", "Kaj Leo", "Kári Cool" og aðrir góðir mans hava røtt, hugtikið og fingið fólk at flenna í kíki. Frændur og Páll Finnur Páll eru millum teirra, sum hava fingið fjøldina at sungið. Í ár vera tað Sjúrður Skaale og Jákup Veihe við Pipar & Salt, sum fara at undirhalda, meðan Terji Rasmussen fer at syngja fyri fólkinum.

Tíð og stað: Vágsbotnur. 29. juli kl. 22.00



G Í LISTAGLUGGANUM

a fremstu listafólkum sýna fram á
í Listaglugganum á ólavsøku. Har
t síggja verk eftir Ingálv av Reyni,
sen, Sigrun Gunnarsdóttir, Zacharis
n av Reyni, Tórbjørn Olsen og øðrum.
guleiki, ið eigur at troytast, tí tað er
degi, at vit hava høvi at síggja so
dygdargóð verk á sama stað.
: Dr. Jacobsens gøta 15. 27.-29. juli.

